ítróttur

Nr. 153 • leygardagur • 13. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

HB hevur ov nógvar góðar spælarar

Vágbingar eru væl fyri, nú teir skulu taka ímóti oddaliðnum, har teir ikki hava havt summarfrí, og tí venja teir ikki so nógv nú, sum teir hava gjørt

VB-HB
Jóannes Hansen

HB skal til Vágs í morgin. Hetta er ivaleyst torførasta uppgávan teir eiga eftir á vegnum móti triðja FM heitinum á rað. HB hevur nógvu tey seinastu árini havt ilt við at fáa fult á Vágseiði. Undantakið var í fjør, tá ið teir vunnu 3-2, eftir at teir høvdu verið frammanfyri 2-0, og VB so var komið afturíaftur. Stóri maðurin á Vágseiði ta ferðina var Andrew av Fløtum, sum skoraði øll trý HB málini.

Andrew av Fløtum er ikki longur í HB, men teir tykjast kortini ikki hava trupulleikar við málskjótingini, sum fyrst og fremst Rógvi Jacobsen og Heine Fernandez hava tikið sær av.

Í flestu feløgunum høvdu spælararnir frí frá venjingunum eina og tvær vikur, eftir at síðsta umfarið í landskappingini varð spælt undan summarsteðginum. Orsaka av steypakappingini og Europa Cup hava teir ongan steðg havt. Í HB hava teir vant fýra ferðir um vikuna. Men seinastu fjúrtan dagarnar hava teir vant tríggjar ferðir um vikuna. Teir siga seg royna at ansa eftir, at spælararnir ikki troyttast ov nógv, uttan at hetta tó skal ganga út yvir fyritreytirnar at vera væl fyri í FM stríðnum.

Allir HB spælararnir eru tøkir undan ferðini til Vágs. Í HB er kappingin um plássini stór. Tað sást eitt nú aftur í, at tað síðsta sunnudag, tá ið HB hevði vitjan av EB/Streymi, ikki var pláss á dómarasetlinum fyri Róki Jespersen, Eli Thorsteinsson og Hendrik Rubeksen, sum allir hava víst seg at hava 1. deildarstøði, tá ið teir hava fingið møguleikan.

VB væl fyri

Við teprum tapi á Skála mistu vágbingar nógv í stríðnum fyri at vinna heiðursmerkir. Men úr Vági verður sagt, at lagið er gott, og at teir gleða seg til at fáa vitjan av HB. Teir dystirnir eru altíð nakað serligt, og teir siga seg ikki duga at síggja, at tað skal vera nakað øðrvísi hesa ferð.

Allir VB spælararnir eru tøkir. Dan Djurhuus var leikbannaður fyri viku síðani. Jón Pauli Olsen spældi í hansara plássi á Skála.

Ofta hevur tað verið soleiðis í Vági, at fleiri av spælarunum á besta liðnum hava verið norðanfyri í arbeiðsørindum ella í skúla. Tað hevur so aftur havt við sær, at tað hevur verið torført at skipa venjingarnar, ella at tað hevur verið neyðugt at vera í fleiri støðum. Soleiðis er tað ikki nú. Allir VB spælararnir hava í hesi vikuni vant á Vágseiði.



Í fjør vann HB í Vági, men annars hevur tað í fleiri ár verið sera trupult hjá teimum á Eiðinum

Julian er á veg út

ÍA tapti við teimum málum á útivølli, har tað ikki eydnaðist at skora týdningarmikla málið, sum kann gerast avgerandi í samlaða roknskapinum

ÚTISETI
Jóannes Hansen

Tað gekst ikki so væl, sum teir í ÍA høvdu vónað, tá ið Akranes hóskvøldikð spældi í 2. innleiðandi umfarinum í UEFA Cup. Dysturin var í Svøríki, har heimaliðið Hammarby vann 2-0. Harvið sær tað einki serligt út, áðrenn heimadystin í Akranesi um tvær vikur. Fyri møguleikarnar hjá ÍA hevði tað verið rættuliga týdningarmikið, um tað hevði eydnast hjá teimum at fáa eitt mál á útivølli, men tað eydnaðist altso ikki.

Hammarby kom á odda í 8. minutti, og teir øktu til 2-0, tá ið tað restaðu tríggir minuttir.

Eftir 2-0 tapið er tað neyðugt hjá ÍA at skora tvey mál á heimavølli, og tað er serliga neyðugt at ansa eftir, at Hammarby ikki fær mál. Um Hammerby fær eitt mál á Akranesi, so verður neyðugt hjá ÍA at skora fýra ferðir. Tískil er talan um rættuliga stóra uppgávu hjá føroyska útisetaliðnum.

Julian Johnsson, sum mikukvøldið í næstu viku verður á landsliðnum ímóti Malta, var sum vanligt á ÍA miðvøllinum, har hann rættuliga hevur vunnið sær fast pláss.

Nýggj manning í Klaksvík

Heimaliðið má roknast at vera favoritur, tá ið klaksvíkingar í morgin fara norður á Mølina, har heimamenninir siga seg vera væl fyri

EB/STREYMUR-KÍ
Jóannes Hansen

Klaksvíkingar hava verið og eru í festivalhýri í góðveðrinum í hesi vikuni. Fótbóltspøtið hevur ikki fylt so nógv, sum tað plagar at gera í Klaksvík. Tað tykist sum um, at teir hava givið skarvin yvir. Hundrað ára føðingardagsárið hjá KÍ gjørdist ikki tað, sum teir høvdu vónað.

KÍ skal norður á Mølina í morgin, og tað er greitt, at tríggir av lyklaspælarunum ikki fara at spæla við. Talan er um landsliðsmálverjan Jákup Mikkelsen, landsliðsspælaran Atla Danielsen og Ova Nysted, sum hevur verið álit í miðverjuni. Jákup er skaddur, og hinir báðir eru leikbannaðir.

Andreas Johannesen, sum spældi fimm minuttir fyrr í summar ímóti FCK, men annars ikki hevur verið á besta liðnum, verður í málinum. Hann hevur staðið seg væl í 2. deild, og tí halda teir í Klaksvík, at tað er ikki annað enn rímuligt, at hann fær møguleikan.

Hvussu teir fara at tippa holini úti á vøllinum er eitt annar spurningur. Ein møguleiki er, at onkrar umskipingar fara at verða gjørdar, so tað verður pláss fyri Juliani Samuelsen ella Arnholdi Joensen ella teimum báðum, og ein annar møguleiki er, at veteranarnir Harley Bertholdsen og Jan Joensen koma inn á plássini hjá leikbannaðu monnunum. Jan Joensen er fyri stuttum farin aftur at venja, eftir at hann leingi hevur verið plágaður av skaða í lærkrikanum.

Hjá EB/Streymi verður sagt, at tað stendur væl til. Allir teir, sum vóru við, tá teir spældu ímóti HB í Gundadali, eru tøkir. EB/Streymur hevur síðani summarsteðgin tapt ímóti bæði B36 og HB.

Sundalagsmenn vóru eitt sindur knotnir, tá ið tað varð sagt her í blaðnum, at fyrireikingarnar hjá teimum til seinna partin av kappingarárinum ikki høvdu verið nakrar serligar. Tað varð sagt, at teir bara høvdu vant tríggjar ferðir, áðrenn teir fingu vitjan av B36.

- Vit vita, at tað ikki er soleiðis. Vit vóru í Italia í summarfrí saman, og vit fóru beinanvegin undir venjingarnar, tá ið vit komu aftur. Tað er rætt, at vit vandu tríggjar ferðir eftir Ólavsøku, áðrenn vit spældu ímóti B36. Men tað kom ikki fram, at vit høvdu vant fleiri ferðir undan Ólavsøkuni. Eitt sindur keðiligt er tað at lesa hetta hjá teimum, sum eru áhugað í felagnum og stuðla okkum. Tí hetta var ikki rætt, sigur liðformaðurin hjá EB/Streymi, Jákup Martin Joensen. Hervið er tann heilsanin borin víðari.

Hóast EB/Streymur hevur tapt tvær tær seinastu ferðirnar, so mugu teir finna seg í, at teir verða roknaðir sum favorittar ímóti KÍ, ið hevur verið rættuliga tannleyst. Tá ið liðini fyrr í summar hittust í Klaksvík, endaði tað 2-2. Hetta var ein av sjey javnleikum, sum KÍ hegirtil hevur verið partur av.

B36 kennir seg støðugt í finaluni

Gøtumenn fáa í Gundadali møguleikan at vísa, at teir nú eru førir fyri at fáa stig frá øðrum enn botnliðunum

B36-GÍ
Jóannes Hansen

B36 er sambært støðutalvuni í løtuni frægasta boðið, um talan skal gerast um, at HB ikki skal verða meistari.

Í báðum royndunum síðani summarsteðgin hava teir í árstalsfelagnum fingið fult, og tað sær ikki so galið út. Burtursæð frá Arnbirni Danielsen, sum hevur ilt við at sleppa av við skaðan í lærkrikanum, sum hevur plágað síðani undan Europa Cup ferðini til Letlands, eru allir spælararnir tøkir. Pól Thorsteinsson hevur ikki vant so nógv saman við hinum í vikuni. Hann hevur runnið fyri seg sjálvan, men teir roknaðu í gjár við, at hann verður tøkur í morgin. John Petersen varð útskiftur í Klaksvík, men hann hevur ongar trupulleikar at spæla.

Tá ið B36 fekk fulla úrtøku í Klaksvík, var Egil á Bø einasti málskjúttin. Øll árini í EB/Streymi og eisini, tá ið hann var í Fuglafirði, var Egil álopsspælari. Eftir at hann var komin í B36, vísti tað seg ikki at vera pláss fyri honum í fremstu røð, har Jákup á Borg og John Petersen vóru sjálvskrivaðir. Tí gjørdist Egil verjuspælari, og hann hevur verið í aftastu røðini síðani 2000 og inntil nú eftir summarsteðgin. Í Klaksvík vísti hann, at møltevinum framvegis ikki bilar nakað.

- Lagið er gott, og tað gongur væl, tá ið vit venja. Vit hava avgjørt ikki mist mótið um, at tað skal eydnast at fáa HB aftur. Men vit eru greiðir yvir, at um tað skal eydnast, so er neyðugt hjá okkum at fáa fult hvørja ferð. Í so máta er talan so at siga um eina finalu hvørja ferð, vit fara á vøllin. Tí hava vit ikki ráð at kiksa ímóti GÍ, sigur Egil á Bø.

Skal standa sína roynd

Í vár gekk sum fyri árinni hjá GÍ. Inntil teir taptu stórt á heimavølli ímóti B36. So gekk tað nógv verri. Síðani summarsteðgin hevur GÍ fingið fult. Fyrst ímóti ÍF og so ímóti B68. Hesi bæði liðini eru á aftastu plássunum. Í Gundadali fær GÍ høvi at vísa, at teir eisini eru førir fyri at fáa stig frá teimum fremstu.

Burtursæð frá Hanusi Jacobsen, sum sá reytt ímóti B68 og tískil er leikbannaður, eru allir GÍ spælararnir tøkir.

Undir venjingunum í hesi vikuni hevur nýggi pólverski spælarin, Adam, sum ímóti B68 taldist millum málskjúttarnar, víst, at hann hevur gott fótbóltsskil. Spurningurin er tí, um hann verður fremstur, ella um hann verður á miðvøllinum, og kanska Súni Olsen, sum seinastu vikurnar hevur víst, at hann er ógvuliga væl fyri, verður fluttur fram aftur í næstfremsta leiklutin.

B36 vann í vár tryggan sigur í útidystinum í Gøtu, men GÍ fyri hava ment seg nógv síðani tá, so alt talar fyri eini spennandi uppgerð sunnudagin

Tað stendur nógv upp á spæl

Allir útlendingarnir eru nú tøkir hjá B68, sum tað er alneyðugt hjá at fáa stig ímóti NSÍ, sum skal royna at fáa fatur aftur í rætta endanum, eftir at teir mánakvøldið mistu alt

B68-NSÍ
Jóannes Hansen

B68 hevur alt kappingarárið verið á aftasta plássinum. Síðani mánakvøldið, tá ið ÍF vann í Runavík, hevur støðan hjá B68 verið uppaftur verri, enn hon var frammanundan.

Í morgin skal B68 royna seg ímóti NSÍ. So fæst at síggja, um teir fara at megna tað sama, sum ÍF megnaði. B68 hevur higartil fingið tvey stig. Um teir skulu hugsa um at varðveita plássið, sum teir síðani 1981 hava átt í bestu deildini, so skulu teir skjótt fáa fleiri stig.

NSÍ hevur tapt tríggjar teir síðstu landskappingardystirnar og steypafinaluna, men teir halda ikki, at tað kortini kann tosast um kreppu. Men teir ásanna, at avrikið ímóti ÍF var ikki gott. Í Vági hildu teir seg spæla væl og at hava óhepnar at tapa. Ímóti HB í steypafinaluni og landskappingardystinum í Gundadali spældi NSÍ leingi við tíggju monnum.

Hesa ferð eru teir í NSÍ væl fyri. Ímóti ÍF vóru Kári Hansen og Alexander Jovevic leikbannaðir. Teir eru tøkir aftur, og tað vil siga, at nú eru allir NSÍ spælararnir tøkir.

Hjá B68 hevur tað staðið illa til við fólki. Enn restar nakað í, at venjarin skal hava møguleikan at manna liðið júst soleiðis, sum hann vil, men tað gongur tann vegin. Jákup Eli Olsen er nú komin fyri seg aftur og er førur fyri at spæla. Hjá brasilumanninum Morinho eru øll loyvini komin upp á pláss, og Anderson, sum orsaka av lítlum skaða ikki spældi við í Gøtu, er komin fyri seg. So er spurningurin, hvussu Trygvi Mortensen fer at blanda útlendsku kortini. Tað er ikki loyvt at hava fleiri enn fýra útlendingar á vøllinum í senn.

Í fyrradagin vísti heimasíðani hjá Norðlýsinum at siga, at spæliloyvið hjá Meinhardt Joensen er flutt úr KÍ og til B68. Meinhardt var málverji hjá KÍ í 2002. Síðani hevur hann orsaka av ryggskaða ikki verið førur fyri at spæla fótbólt. Nú hevur hann vant aftur, og ætlanin er, at hann skal venja og spæla við B68 í september mánað. Næstu tvær vikurnar verður hann uttanlands í arbeiðsørindum.

Tá ið NSÍ fyrr í summar hevði vitjan av B68, var talan um tætta uppgerð, sum heimaliðið vann 3-2. Dysturin á Svangaskarði millum hesi feløgini í fjør var rættuliga dramatiskur og spennandi. Tað endaði við, at B68 vann 3-2.

Grannar í mótsattu leguni

Tað er merkisvert, at meðan NSÍ venjarin er gamal B68 spælari, so er B68 venjarin gamal NSÍ spælari. Jógvan Martin Olsen, sum venur NSÍ, býr á Toftum - eitt hanagleiv frá Svangaskarði, og Trygvi Mortensen, sum venur B68, býr í Runavík - lítið meiri enn eitt hanagleiv frá vøllinum við Løkin.

Felags fyri teir báðar er, at teir ongantíð spældu í øðrum felag enn í barndómsfelagnum. Inntil stutt undan summarsteðginum var Trygvi Mortensen hjálparvenjari hjá Jógvani Martin Olsen í NSÍ. Í morgin verða teir ábyrgdarmenn fyri liðini, sum skulu stríðast á Svangaskarði.

Útlendingarnir klárir í Fuglafirði

Á Skála ætla teir at halda tørn um heiðursmerkjaplássið, sum teir framvegis eru á, og teir siga seg vera hampuliga væl fyri

ÍF-SKÁLA
Jóannes Hansen

Tað verður søguligur dystur í Fuglafirði í morgin. Hetta verður fyrsta ferðin nakrantíð, at ÍF og Skála fara at hittast í landskappingardysti í Fuglafirði í bestu deildini. Tey bæði undanfarnu árini hevur Skála verið í bestu deildini, men ÍF hevur verið í 2. deild. ÍF hevur ofta áður verið í bestu deildini, men tá hevur Skála ikki verið har. Tá ið hesi bæði liðini fyrr í ár hittust á Skála, var tað rættuliga undirhaldandi og málríkt. Skála vann 4-3.

Mánakvøldið fekk ÍF eitt orduligt skump rætta vegin, tá ið teir vunnu 2-1 í Runavík. Fuglfirðingar stríddust rættuliga væl, og tað er sjálvandi týdningarmikið at varðveita hugburðin frá tí dystinum, nú teir skulu gera nýggja roynd at økja um frástøðuna aftur til B68.

Í Runavík sá Bartal Eliasen reytt. Hann er tískil leikbannaður ímóti Skála. Rúni Elttør var leikbannaður ímóti NSÍ. Hann er tøkur aftur. Ein møguleiki er, at Rúni fer at spæla í miðverjuni, og ein annar er, at Áki Petersen verður fluttur av høgra vongverja og í miðverjuplássið.

Seinastu knappliga tvær vikurnar hava tveir útlendskir spælarar vant við ÍF. Sum tað hava skilt tað, so eru øll loyvini hjá teimum nú komin upp á pláss. Tað er væl hugsandi, at í hvussu so er annar teirra verður á liðnum í morgin. Um so verður, so verður tað í álopsplássinum undir liðini á Magna á Lakjuni, sum hevur verið sera væl upplagdur síðstu ferðirnar.

Eitt ivamál

Á Skála er tað greitt, at Hanus Thorleifsson ikki verður førur fyri at spæla í morgin. Hann hevur í eina tíð havt trupulleikar við fótinum, og hann hevur ikki vant síðstu tíðina. Tað er ivasamt, um Arnhold Berg, sum hevur staðið seg ógvuliga væl í miðverjuni, verður førur fyri at spæla. Hann hevur trupulleikar í rygginum. Seinastu vikurnar hevur hann ikki verður førur fyri at venja saman við hinum, men hann hevur kortini spælt, og í gjár vónaðu teir á Skála, at hann eisini verður førur fyri at spæla í Fuglafirði. Men teir ivaðust eitt sindur í tí.

Sveinur Justinussen, sum í fjør var rættuliga stinnur, hevur vant við síðstu mánaðirnar. Hann hevur verið í liðnum onkra lítla løtu. Eingin ivast í, at hann er førur fyri at røkja fast pláss. Janus Trúgvason er heima í summarfrí. Hann hevur vant nógv í summar, og hann er eisini ein møguleiki. Ímóti VB var Nenad Stankovic ikki við. Hann er klárur aftur. Rúni Rasmussen spældi ímóti VB í plássinum, sum Nenad plagar at vera í.

Skála tapti síðsta heimadystin undan summarsteðginum 3-2 ímóti EB/Streymi. Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin taptu teir 4-1 í Gundadali ímóti HB. Ta ferðina varð sagt, at leikliga avrikið var betri enn til so stórt tap. Skálamenn hava ongantíð áður verið í nánd av at vinna heiðursmerkir. Teir eru framvegis á triðja plássinum, og ta ið teir fara til Fuglafirðar í morgin verður tað við tí í hyggju, at plássið skal varðveitast.

Dystir og dómarar

1. deild sunnudagin 15. august
B36-GÍ: . . . . Páll Augustinussen
VB-HB: . . . . Lassin Isaksen
ÍF-Skála: . . . . Birgir Sondum
B68-NSÍ: . . . . Eiler Rasmussen
EB/Streymur-KÍ: . . . Georg Rasmussen

2. deild leygardagin 14. august
TB-B36: . . . . Petur Hans Joensen
FS Vágar-VB: . . Hans Falkvard Hansen
LÍF-Royn: . . . . Rúni Gaardbo
AB-KÍ: . . . . Petur Reinert

2. deild sunnudagin 15. august
Sumba-B71: . . . . . . Jens Petur Brattalíð

3. deild sunnudagin 15. august
Fram-GÍ: . . . . Andrew Christiansen
EB/Streymur-SÍ: . . . . . Edvard Højgaard
B68-NSÍ: . . . . Jóannes Mikkelsen
ÍF-Skála: . . . . Jónleif Frederiksen
TB-HB: . . . . Mihai Matai

Kvinnur sunnudagin 15. august
FS Vágar-GÍ/B68: . . . . . Kristin av Kák
AB-Sumba: . . . . Laurits í Króki
EB/Streymur-B36: . . . . Jan á Líðarenda
(útsettur)